**»The Pursuit of Happyness« við Will Smith:**

# At leita eftir eydnuni og amerikanska dreyminum

## Ummæli




Kim Simonsen
kimsimonsen@hotmail.com


**Onkuntíð er hart at liva og at fáa endarnar at røkka saman. Í filminum Jagten på lykke/»The Persuit of Happyness« spælir Will Smith familjufaðirin Chris, ið skal berja seg fram. Hann vil verða meklari og berjist við tjúgu onnur, ið eisini vilja hava starvið sum meklarar í sama felagnum. Konan hjá Chris er rýmd. Hann er nú einsamallur við soninum og nógvar rokningar eru at gjalda**





Tað er 1981 í San Fransisko. Chris Gardner arbeiðir sum seljari. Hann stríðist, men hevur onga eydnu á økinum. Hann hevur roynt at missa alt og ikki hava framgongd, men konan (Thandie Newton) heldur so lítið um hansara vantandi eydnu sum vinnulívsmaður, at hon rýmur.

Ein dag sær hann ein partabrævasølumann við einum Ferrari. Hann fer at royna seg sum praktikantur hjá einum stórum kendum felag, ið selir og keypir partabrøv.

Søgan í »The Persuit of Happyness« er rørandi og góð, tí fær hann ikki arbeiðið, so noyðast hann og sonurin at búgva á gøtuni.

### Amerikanski dreymurin

Filmurin The Persuit og Happyness er um amerikanska dreymin. Ikki ein hálovan av hesi so sera amerikansku hugmyndafrøði sum so, men onkunstaðnis er bæði hesin evindaligi amerikanski dreymurin og løgna amerikanska hugmyndafrøðin, ið harðliga boðar, at øll kunnu koma fram í heiminum, er fram um alt evnið í hesum filminum.

Amerikanski dreymurin boðar, at um fólk berjast og arbeiða hart, so skulu tey ein dag fáa virðing, framgongd og møguleikar. Hin vegin vilja amerikanarar helst ikki tosa ov nógv um baksíðuna av amerikansak dreyminum, ið t. d. tey heimleysu, fongslaðu og fátæku umboða.

### Amerikansk mentan og vit

Vit hava øll høvdið á tremur við amerikanskari mentan, fordómum og hugmyndum um hetta land. Við filmum, rokki og bókmentum. Vit eru fóðrað við hesum amerikanska dreyminum. Sjálvur havi eg brúkt megin-partin av lívinum at hyggja eftir amerikanskum filmum.

Andrass Dunna er t. d. ein amerikudunna og kanska ímyndin upp á amerikanska dreymin. Gubbin Joakim er innflytarin, ið svav í eini kommoduskuffu í Skotlandi og nú svevur í eini song til støddar sum ein tennisbani, og er meira einsamallur enn nakrantíð. Í síni gírigheit er hann ein ólukkulig dunna.

Í filminum »The Persuit of Happyness« møta vit einum, sum berjist við øllum hann kann seta til hendan tilverubardagan over´there. Hann er hin ævigi undirhundurin, ið bara má og skal vinna kosta hvat tað vil. Prísur er høgur, hann kann eisini missa alt sum hann hevur kært.

Filmurin er um vón og um ein mann, ið ikki vil drepa gamla amerikanska dreymin. Tað er sum við Rocky Balboa, tað er altíð ein 10. umgangur, og alt er ikki avgjørt, fyrr enn hin stóra konan syngur.





### "Based on a true Story"

Sum so ofta fyrr, so byggir hendan søgan á eina veruliga søgu. »The Pursuit of Happyness« er skrivað av ein veruligum vinnulivsmanni, kallaður Chris Gardner, ið varð noyddur at berjast fyri at sleppa undan lívinum sum heimleysur. Í dag er hann stjóri á partabrævafyritøkuni Gardner Rich & Co. Alt hetta kom av, at hann slapp innum gáttina sum praktikantur í 1981.

Hesin filmurin er heldur óvanligur, eg kom at hugsa um unga Dusty Hoffmann í Kramer vs. Kramer, har hann berjist fyri at fáa lívið at ganga sum tað skal fyri seg og sonin. Tó er hesin filmurin ikki so góður sum klassikarin við Dustin Hoffman og Meryl Streep. »The Persuit of Happyness« er ein meiri vanligur filmur, men Will Smith og sonur hansara (Jaden Smith) spæla væl.

4 stjørnur av 6.

### Fakta um The Pursuit of Happyness

**Leikandi:**

| | |
|---|---|
| Chris Gardner | Will Smith |
| Christopher | Jaden Smith |
| LindaThandie | Newton |
| Jay Twistle | Brian Howe |
| Martin Frohm | James Karen |
| Alan Frakesh | Dan Castellaneta |
| Walter Ribbon | Kurt Fuller |
| Fru ChuTakayo | Fischer |
| Verdens bedste far | Kevin West |
| Arbejder | George Cheung |

Leikstjóri Gabriele Muccino. USA 2006. 117 minuttir. 7 ára aldursmark. Frumframførdur í Havnar Bio 2. februar 2007. klokkan 20.15.